Formaðurin í búskaparráðnum:

# Nei til hetta slagið av føroyskari oljuvinnu

**– Eg ivist í um suðuroyingar hava mist nakað, hóast oljuhavnin ikki verður á Drelnesi. Eg haldi yvirhøvur, at vit skulu halda okkum langt burtur frá hesum slagi av oljuvinnu, sum tað nú er lagt upp til, sigur Hermann Oskarsson, formaður í Búskaparráðnum**

OLJUVINNA
*Áki Bertholdsen*

– Eg veit ikki, um suðuroyingar hava mist so nógv. Eg veit heldur ikki, um norðingar hava fingið so nógv. Hermann Oskarsson, formaður í Búskaparráð num, ivast stórliga í, um føroyingar hava sett røttu kósina, nú vit av álvara eru á veg upp í oljuvinnuna.

Hann heldur, at eftir leistinum, sum nú er skorin, koma føroyingar ikki at fáa varandi gagn av oljuvinnuni.

Tvørturímóti heldur hann, at soleiðis, sum vit hava stungið út í kortið, er tað ov stórur vansi fyri, at vit í stóran mun ikki verða annað enn arbeiðsfólk á lægsta stigi í oljuvinnuni og at vit heldur ikki koma longur.



*– Tað hevði verið nógv betri fyri føroyingar, um útgerðarhavnin til oljuvinnuna lá í Aberdeen, heldur enn í Runavík, í Havn, á Drelnesi, ella onkra aðra staðni í Føroyum, sigur Hermann Oskarsson, formaður í búskaparráðnum*

– Tað, vit áttu at gjørt, var at borið so í bandi, at vit fingu so stóra vinnuliga og tekniska serfrøði av alskyns slagi, burturúr oljuvinnuni, sum gjørligt, so at vit sótu eftir við eini serfrøði og eini vitan – eisini eftir at oljan er uppi.

– Men soleiðis, sum tað nú sær út, koma vit í allar størsta mun at vera tey, sum ikki koma longur enn bara at gera tað handaliga arbeiði, sum alt samalt heldur uppat í somu løtu, oljan er uppi, ímeðan tað verða útlendingar, sum sita eftir við vitanini og serfrøðini.

## Alt um útlendskan bryggjukant

Vit hava spurt búskaparfrøðingin um, hvat hann heldur um tað, at tann føroyska oljuhavnin verður løgd í miðstaðarøkinum, har tað er ivaleyst av virksemi rammanundan. Og nú oljuvinnan kemur afturat, eru tað summi, sum frykta fyri, at tað fer at føra til, at búskapurin í miðstaðarøkinum verður alt ov heitur og at prísirnir fara upp í loft, t.d. húsum og á lønum.

Hetta hevur Hermann Oskarsson ikki so góðan hug at svara uppá, tí hann hevur ikki hugsað so nógv um, hvørja ávirkan oljuvinnan fer at fáa á ávís øki í landinum. Hann hevur mest gjørt sær tankar um, hvørja ávirkan oljuvinnan fer á landi sum heild, uttan tó á nakran hátt at hava granskað málið til botns.

Og í fyrstu atløgu heldur hann, at tað var eitt mistak av føroyskum politikarum, at teir kravdu, at alt, sum skal flytast í sambandi við oljuvinnuna, skal um føroyskan bryggjukant.

Hann er tvørtur ímóti líka við at halda, at Løgtingið heldur skuldi lóggivið um, at onki skuldi um føroyskan bryggjukant.

– Í øllum førum eiga vit at fáa sum minst um føroyskan bryggjukant.

Hann sigur, at vit hava eitt vinnulív í Føroyum, ið á summum økjum longu nú hevur trupulleikar við at fáa fólk.

– Og tað verður ikki serliga samfelagsgagnligt at fáa eina vinnu afturat, sum leggur hald á nógv fólk.

– Tað, at vørur og tænastur skulu um føroyskan bryggjukant, kastar bara handaligt arbeiði av sær. Tað einasta, vit fáa burturúr tí, eru tær lægstu lønirnar, tær lægstu útbúgvingarnar og tað minstu vitanina.

Hermann Oskarsson sigur, at tað er halda vit, at vit fáa nakað burturúr oljuvinnuni uppá hendan mátan, mistaka vit okkum stórliga.

– Skal hetta vera okkara luttøka í oljuvinnuni, førir tað onki nýtt við sær til samfelagið. Tað bara leggur hald á arbeiðsmegi og tað haldi eg er ørskapur.

Hann heldur, at ístaðin fyri at brúka alt fólkið til tað handaliga arbeiði, er tað líka við, at vit heldur áttu at latið útgerðarhavnina verið uttanlands, so at onnur kundu gjørt tað handaliga arbeiði, sum skal til.

– Hinvegin eiga vit leggja dentin á at brúka tað fólki, vit hava, til at taka lut í oljuvinnuni á hægri støði á tí tekniska og handilsliga økinum.

– Hetta hevði hækkað vitanarstøðið í samfelagnum munandi og givið okkum eina serfrøði, sum vit fáa varandi nyttu av. At gera handaligt arbeiði, læra vit onki av. Og hetta slagi av arbeiðið heldur uppat í somu løtu, sum oljuvinnan heldur uppat. Tað einasta, vit fáa burturúr, er, at vit tá fara vit eisini at sita eftir við stórum kapasiteti á nógvum ymsum økjum, sum vit ikki fáa brúkt til nakað sum helst. Men vitan hava vit onga, tí at gera handaligt arbeiði fyri oljuvinnuna, fer ikki at gera okkum betri før fyri at byggja samfelagið út.

## Suðuroyingar onki mist

Tí heldur Hermann Oskarsson ikki, at suðuroyingar hava mist nakað, fyri tað um teir ikki fingu útgerðarhavnina .

– Tað er rætt, at suðuroyingar hava mist nøkur arbeiðspláss til fólk, sum kunnu gera handaligt arbeiði. Men er tað hetta, sum er framtíðin fyri suðuroyingar. Eg haldi heldur, at tann, sum leggur dentin á at fáa fólk í oljuvinnuna á hægri støði, fær nakað varandi burturúr. Og í hesum sambandi ger tað ikki mun, hvar í landinum, ein býr.

– Tískil kann tað tað eisini væl vísa seg, at tað verður ein stórur vansi fyri miðstaarøkið, um oljuvinnan kemur afturat. Á summum økjum knípur at fáa fólk til tað sum er og tað er ørskapur at leggja hald á nógv fólk afturat í oljuvinnuni- fólk, sum annars kundi verðið brúkt til at smíða, fiska o.s.fr.

Hermann Oskarsson sigur, t.d. at oljufólk hava fortalt honum, at allir elektrikarar í landinum eru ikki nóg mikið til at veita oljuvinnuni tænastur. Og bara ein boripallur brúkar meiri streym, enn allar Føroyar gera tilsamans.

---

# Trúgva ikki uppá eina framtíð í Suðuroynni



*– Tað er neyðugt at Suðuroyggin fær nýggjan íblástur, tí sum er, trúgva fólk ikki uppá eina framtíð í oynni, sigur Bogi Mortensen, sum eisini er formaður í økisnevndini, sum nú leggur seinastu hond á eitt álit til landsstýrið um støðuna. Hendan íblásturin kundi oljuvinnan givið okkum, leggur hann afturat*

**–Eitt betri vinnuligt grundarlag er heilt avgerðandi fyri framtíðina hjá Suðuroynni, sigur Bogi Mortensen, vinnulívsmaður í Suðuroy og formaður í økisnevndini, sum fer at handa landsstýrinum álit í næstum**

OLJUHAVN
*Áki Bertholdsen*

– Vit hava brúk fyri nýggjum íblástri í Suðuroynni, sum kann geva fólki trúnna uppá eina framtíð her á plássinum.

Bogi Mortensen, vinnulívmaður í Suðuroy er ikki heilt samdur við Hermann Oskarsson, formann í Búskaparráðnum, um, hvønn týdning ein oljuhavn hevði havt fyri Suðuroynna.

Aðrastaðni í blaðnum sigur Hermann Oskarsson, at hann ivast í, um ein útgerðarhavn er tað, sum gagnar suðuroyingum best í løtuni.

Bogi Mortensen sigur tvørturímóti at ein oljuhavn hevði havt stóran týdning fyri Suðuroynna.

Í Økisnevndini hevur hann seinastu tíðina lagt stóra orku í at gera eina nágreiniliga lýsing av viðurskiftunum í útjaðaranum í Føroyum og hann hevur so eina aðra fatan av støðuni, enn formaðurin í Búskaparráðnum hevur.

– Í Suðuroynni hava vit sett vónirnar til, at hon skuldi koma. Tað, sum vit harðliga hava brúk fyri, er oyggin fær nýggjan íblástur.

## Tølini eru ljót

Hann sigur, at í álitinum, sum Økisnevndin fer at handa landsstýrinum einaferð í næstum, sæst, at støðan í Suðuroynni er alt annað enn góð, tí bæði tølini fyri burðaravlop, fólkatal, aldursbýtið í fólkinum o.s.fr. eru ljót, sum hann tekur til.

– Hetta eru viðurskifti, sum ikki kunnu loysast við krónum og oyrum eins og onnur viðurskifti, eitt nú lønarspurningar og annað. Hesir trupulleikar stinga djúpari enn so.

– Tí er tað neyðugt, at oyggin fær nýggjan, vinnuligan íblástur, sum kann geva fólki trúnna uppá eina framtíð í Suðuroynna.

– Í løtuni halda fólk ikki, at tað er nakað at vera í Suðuroynni til - og tað er so slett onki at flyta í oynna til.

– Tí kundi ein nýggj vinna, sum oljuvinnan, givið fólkið eitt positivt signal. Í løtuni haldi eg, at tað er skilligt, at fólk hava ikki álit á eini framtíð í Suðuroynni.

– Og tað eru júst tær vinnuligu umstøðurnar, sum eru fremsta fortreytin fyri at fólk kann støðast her. Vit kunnu hava so nógvir skúlar og aðrar "hentleikar", sum vit vilja, men tað er tær vinnuligu umstøðurnar, sum gera av, um fólk støðast ella ikki. Tí verða tað eisini tær vinnuligu umstøðurnar, sum gera av, antin gongdin í Suðuroyni kann vendast, ella ikki, sigur Bogi Mortensen.

Annars heldur hann, at suðuroyingar eru hampiliga væl fyri á nógvum øðrum økjum.

– Her eru nógv viðurskifti, har vit eru væl fyri. Barnaansingin er útbygd og eldrarøktin er hampliga væl skipað og útbygt. Sjúkrahús er í oynni, so ta trygdina hava vit eisini. So alt í alt eru vit hampiliga væl fyri, hvat trivnaði viðvíkur. Men er onki arbeiði, kann alt gera tað sama, leggur hann afturat.

## Líka væl fyri sum aðrastaðni

Annars heldur hann, at vinnan í Suðuroynni er líka væl fyri at veita oljuvinnuni tænastur, sum vinnan aðrastaðni í Føroyum er.

– Men samferðslan til og úr oynni ger, at vinnan arbeiðir fyri tað mesta í Suðuroynni, tí hon hevur ikki serliga góðar møguleikar at átaka sær arbeiði aðrastaðni í Føroyum. Har hevur vinnan noðranfjørðs heilt aðrar møguleikar, tí har er tað mesta landfast og skjótt at ferðast ímillum.

– Tí høvdu vit vónað, at oljuvinnan kundi verið við til at ment vinnulívið her suðuri og skapt fortreytir fyri, at fólk kundi støðast í oynni.

Annars skilir hann ikki, hvussu tað ber til, at eitt felag, sum Danbor, ið hevur havt útgerðarhavn í 22 ár, kann verða vrakað.

– Tað er ógvuliga ilt at skilja, at Danbor hevur bjóðað eina ætlan fram, sum ikki kann brúkast. Nakrar orsøkir til, at Suðuroyggin varð vrakað, er at havnin á Drelnesi er ikki nóg djúp og samferðsluviðurskiftini eru ikki nóg góð.

– Bogi Mortensen vísir hinvegin á, at serfrøðingarnir hjá Danbor, sum altso hava drúgvar royndir, hava mett um støðuna og hava mett, at ein oljuhavn liggur væl fyri í Suðuroynni. Tí skilir hann framvegis ikki, at oyggin ikki kann brúkast, tí hann heldur, at tað er undarligt, at Danbor metir so skeivt.

Hinvegn noktar at at trúgva uppá, at landsstýrið hevur hevur havt ein fingur við í spælinum og hevur fingið oljufeløgini at vrakað Drelnes fyri at sleppa undan at gera eina nýggja samferðsluhavn í Suðuroynni.